lesarabrøv

Argja kommuna rindar TK — og vil framvegis

Í grein hósdagin 31. januar 1991 skrivar Sosialurin við feitari skrift, at Argja kommuna vil ikki gjalda sín part av samstarvinum millum Argir og Havnina. Tað, sum er áhugavert at vita, er, hvør gevur hesar rongu upplýsingar. Argja kommuna hevur ongantíð sagt seg ikki vilja gjalda og hevur eisini gjørt tað. Besta prógvið man vera seinasta niðanfyristandandi kontoavrit frá TK til AK, har ein stór inngjalding gongur fram og har saldoin pr. 31/10-90 vístir kr. 129.743,08 Argja kommunu til góðar. (hjálagda kontoavrit).


Argja kommuna hevur eisini goldið acontogjald í januar 1991, áðrenn nakað skriv frá TK kom.

Tað, sum ein má loyva sær at spyrja, er, hvør ið gevur Sosialinum avrit av skrivum TK. Men eru teir so raskir at endurgeva næstan alt brævið, hví nevna teir ikki tað, sum TK førir fram, at verandi búskaparstøða eisini spælir inn í avgerðina um at flyta børnini øll heim um Sandá.

Tá Sosialurin nevnir, at ruskbrenningin á Sandvíkahjalla ikki fær hildið fram, so má hetta vera bæði manglandi kunnleiki um skipan og eisini giting teirra. Einki skriv er um hetta og tað skuldi eingin orsøk verið fyri tí. Brennistøðin er sjálvognarstovnur og hevur sum so einki við TK at gera. Men harumframt so hevur AK rindað ásetta gjaldið hvønn mánað — eisini januar 1991.

Men allar hesar rongu upplýsingar kundu verið umgingnar, um blaðmaðurin á Sosialinum livdi upp til gott blaðstarv og spurdi hin partin í málinum, áðrenn nakað varð sett á prent.

Vegna Argja kommunu
Erland T. Jacobsen, form.


TÓRSHAVNAR BYRÁÐ
Rokskapardeildin

KONTO AVRIT

KONTO NR.	[illegible]
DAGFEST	31-10-90
AVRIT NR.	10
SÍÐA	1

DAGFESTING	SKJAL NR.	TEXSTUR	DEBET	KREDIT
[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]

Í grein síni her omanfyri skrivar formaðurin í Argja kommunu, Erland T. Jacobsen, at Sosialurin endurgevur bræv frá Tórshavnar kommunu til Argja kommunu.

Hetta er ikki rætt.

Keldan til tíðindini í hósdagsblaðnum var als ikki nakað bræv. Undirritaði hevur ikki sæð brævið, men veit um, at Tórshavnar kommuna hevur sent bræv til Argja kommunu.

Hetta varð eisini nevnt í greinini, sum rætt er.

Tað, Erland T. Jacobsen kallar „rangar upplsingar", er ein søk millum kommununar áðar.

Brævið, sum undirritaði hevur hoyrt um, sigur – sambært keldu blaðsins – at millumverandi er millum Argja kommunu og Tórshavnar kommunu, sum skal fáast í rættlag, tí annars fer Tórshavnar kommuna at taka ávís stig.

So tað „ranga" í hesum tíðindum er *ikki* tað, Sosialurin skrivar.

Men hinvegin er tað ein sannroynd, at Tórshavnar kommuna hevur skrivað bræv til Argja kommunu, har biðið verður um at fáa øll millumverandi gjørd upp og fingin í rættlag.

Er okkurt í hesum góða brævi, ið ikki ruggar rætt, má tað vera ein søk millum kommunurnar.

Virðingarmest
Hilmar Jan Hansen

Vónandi nýggj rúsdrekkalóg

Í Dimmu leygardagin 5.5.-90 letur ein persónur, ið undirskrivar seg »Ein, ið ilskast«, øgiliga illa at, tað kundi næstan ljóðað sum ein, ið hevur drukkið illa og hevur fingið boð frá lækna um at nú er komið so langt, at bara tveir møguleikar eru eftir. Í hin hvíta kassan ella at geva uppat, ella ein sum bara leitar eftir tí negativu síðuni. Annars er altíð best, at eitt mál verður kannað út frá báðum síðum. Annars kostar ein kassi av gulløli 365,- kr., hvørki meir ella minni og ein av hinum 290,-. Nú eru nógv mál á skránni í dag, t.d. P-talið, rúsdrekkamálið, fiskabýtið o.a. Men tað nyttar einki bara at tosa og tosa og so einki gera. Tað, ið tað heila strandar uppá, er at hesir góðu menn, ið siga seg vita so øgiliga væl beskeð um tað heila, ganga í seg sjálvan fyrst, áðrenn teir fara og siga tí meiniga manninum, hvar skápið skal standa. Teir kunnu ikki bara siga beint út at tey og tey bróka ov nógvar pengar, men samanum tikið er ikki neyðugt at vera geni ella flogvit til at finna útav, at støðan í samfelagnum sjáldan hevur verið so ring sum hon er í dag. So kann ein spyrja, hvør skal nú spara. Nú er komið so langt út á tromina, at øll mugu minka eitt sindur um forbrúkið, høgur sum lágur, líkamikið. At lurta ov nógv eftir politikarunum hevur ongantíð ført til nakað, teir hava jú altíð meir enn eina tungu í heysinum, tí bara uppundir val at standa og halda langar røður, ið næstan ongan enda fáa, dugir ikki og hevur ongantíð dugað og kemur heldur ongantíð at duga. Um vit fara aftur til ár 1900 ella har á leið, tá kundi ein líta á tey orð, ein maður ella kvinna segði, men í dag kann ein stórur partur av arbeiðinum í Løgtinginum og Landsstýrinum javnlíknast við tá ið man fer í sirkus og okkurt óvæntað er á skránni. Ella uppá ein annan máta, eitt stórt komediuspæl.

Nú er nakað síðan eg skrivaði hesar reglur. Nú hava vit fingið nýtt landsstýri, nýggjar løgtingsmenn og nýggjan løgmann, Atla P. Dam.

Nú vit skriva 28.01.91 hava teir ikki fingið nakað serligt frá hondini, eg og kanska onnur vóna okkurt kemur seinni. Eg nevndi fyrr í brævinum rúsdrekkamálið, tað vísir seg sum tað er eitt so heitt mál, at eingin torir at gera nakað við tað. Men nú sær út sum at okkurt fer at henda. Marita Petersen ætlar at leggja broytingar fram, so kanska vit fáa eina rúsdrekkalóg, ið svarar til 1991, tí lógin, sum er, er so gjøgnumholað, at tað hálva er meira enn nokk.

klaksvíkingur

Ábyrgd og avleiðingar

Ein spurningur, sum tey meinigu starvsfólkini á teimum almennu stovnunum spyrja seg sjálvi er: hvar liggur ábyrgdin av rakstrinum, og hvør eigur at taka avleiðingarnar av einari møguligari vánaligari stýring.

Nú tá ið kanska hundraðtals almenn starvsfólk innan ymiskar almennar stovnar — flestøll meinig starvsfólk — bíða eftir at vera stoytt útav **arbeiðsloysisnipuni** og niður í eina ógvuliga óvissa framtíð, munnu fleiri spyrja seg sjálvi: Skal tann, ið onga ábyrgd hevur, líða fyri tað, ið tann ið ábyrgd hevur, hevur verið atvoldin til.

Sum í fyrsta heimsbardaga

Skal tað vera sum í fyrsta heimsbardaga, har bara meinigir hermenn blivu sendir upp úr skotgrøvunum og í vandan, alt meðan yvirmenninir hugnaðu sær í bunkarunum og løgdu nýggjar slagætlanir, hissini ferð komu teir út úr bunkarunum fyri at útnevna onkran av teimum meinigu hermonnunum, ið yvirlivdi slagið, til **korpurál** (t.e. undir yvirmaður) — einamest teir, ið høvdu mist ein arm ella bein. Hesir blivu so sendir heim til eina óvissa framtíð — tvær skrástrikur á jakkaermuni munaðu lítið.

Ein ræðulig hending, men samstundis **ein greflig mynd**, ið ein eigur at læra av.

Ongar reglur fyri ábyrgd

Reglur áttu at verið gjørdar av okkara fólkavaldu, har skorið varð út í papp — hvar ábyrgdin av einum almennum stovni liggur — og hvør eigur at taka avleiðingarnar av rakstri og stýring av hvørjum einstøkum stovni, líka mikið hvønn stovn talan var um.

Enn einaferð tykist tað, sum um yvirmenninir leggja slagætlanina til rættis, meðan meinigi maðurin skal taka avleiðingarnar. Hevði rætt verið atborið, áttu fyrstnevndu at tikið ábyrgdina av slagætlanini.

Greiða linju

Tey ráðandi her á landi áttu at hava gjørt greiðar linjur! At **ábyrgdin og avleiðingarnar** av at hava ábyrgd hoyra saman sum knivur og gaffil. Avleiðingarnar eiga ikki at fáa fylgjur fyri tey skeivu, nevniliga tað meiniga starvsfólkið. Róðrið stýrir hjólunum og ikki umvent. Sum er, eru almennu topparnir friðaðir meir enn sjálvt lomvigin.

Við tøkk fyri upptøkuna

hin hási eygleiðarin

Dómarnir í Klaksvíks-stríðnum vóru politiskir

Eg havi sent greinar til donsk (og onnur) bløð. Men eru tær altíð falnar fyri sensurinum, ikki prentaðar í hesum bløðum, og er hetta lógarbrot, tað er beint ímóti Grundlógini, har tað stendur, at sensurur verður avtikin, og aldrin aftur innførdur. Men, Jógvan við Keldu, og Lydia Arge, tey bæði fáa innivist í donskum bløðum. Hatta minnir meg á tað, eg havi lisið um Jóannes bónda, tá hann, av sambandsfólki, ella dønum, varð útspiltur, og dálkaður í donskum bløðum, og fekk ikki loyvi at verja seg og svara aftur, (beint ímóti Grundlógarinnar bókstavi, og anda!!!) Tískil svaraði Jóannes bóndi hesum álopum aftur í norskum bløðum. Viðvíkjandi Klaksvíks-stríðnum, var tað eitt politiskt stríð, og dómarnir politiskir.

Tað er møguligt, at danir tigandi høvdu funnið seg í, um t.d. týskarar høvdu givið um um at uppsiga ein lækna í Danmørk, og staðin fyri seta annan týskara. Men, slíka framferð vildu klaksvíkingar ikki lata sær lynda. Danir tóku so til imperialistiska valds misnýtslu. Fólkaflokkurin var ikki syndabukkur. (Tí, ein syndabukkur er ósekur í tí, hann fær skuld fyri.) **Nei**, Fólkaflokkurin var **syndarin**, saman við Sambandinum. Tað vóru teir báðir, Hákun Djurhuus og Kristjan Djurhuus, ið boðsendu danska løgreglu, **og** hundar, til at meinsla og kúga klaksvíkingar. Hatta stendur alt rimmarfast.

Sjúrður Joensen